# Metini hjá Atla Da



*Atli P. Dam er tann, sum hevur sitið longst í løgmansembætinum. Metið hjá honum verður neyvan tikið. Hann sat fyrstu ferð sum løgmaður í 10 ár út í eitt. Eftir fýra ár í andstøðu sat hann aftur sum løgmaður í fýra ár frá 1985-89. Eftir stóra sigurin hjá Javnaðarflokkinum á valinum í 1990 skipaði hann aftur samgongu og var løgmaður frá 1991-93, tá Marita Petersen, sála, tók yvir løgmanssessin og formanssessin í Javnaðarflokkinum, tá Atli P. Dam legði frá sær*

**Atli Dam var uttan parlamentariskar royndir, tá ið hann fyrstu ferð gjørdist løgmaður, men sinniliga og likamliga styrkin og politiska tevið og viljin bóru við sær, at hann sat longri í løgmansembætinum enn nakar annar, og tað er lítið ella mest sum ikki sannlíkt, at metið nakrantíð fer at verða tikið**

ATLI DAM FARIN

*Jan Müller*

Atli Dam er tann, sum higartil hevur sitið longst í løgmansembætinum, síðani hetta embætið varð fingið inn aftur í føroyska politikkin. Tað varð tað, tá ið Heimastýrislógin varð sett í gildi í 1948. Síðani tá hava tíggju løgmenn staðið á odda fyri landsstýrinum. Jóannes Eidesgaard er tann ellinti løgmaðurin.

Eingin hevur sitið í løgmansembætinum í nánd av so langa tíð og harvið staðið á odda fyri so nógvum samgongum, sum Atli Dam hevur gjørt tað. Atli gjørdist fyrstu ferð løgmaður eftir løgtingsvalið í november 1970. Samgongan varð skipað 10. desember í 1970, og Atli Dam var løgmaður uttan slit til 5. januar í 1981. Hann tók við aftur 10. januar í 1985 og sat inntil 18. januar í 1989, og so varð hann aftur løgmaður frá 15. januar í 1991 og inntil 18. januar í 1993.

Tað vil við øðrum orðum siga, at Atli Dam var løgmaður í 16 ár ein mánað og sjey dagar. Næstlongstu tíðina í løgmansembætinum hevur Kristian Djurhuus átt. Hann var løgmaður í 10 ár ein mánað og seytjan dagar.

Í tey gott og væl sekstan árini, sum Atli Dam var løgmaður, stóð hann á odda fyri samgongusamráðingum eftir fimm val, og eina ferð skipaði hann tvær samgongur í einum valskeiði. Tá ið Atli Dam fyri síðstu ferð legði løgmansstarvið frá sær í januar í 1993, hevði hann verið samgonguleiðari hjá øllum flokkunum, sum høvdu verið umhoðaðir í løgtinginum í hansara tíðarskeiði í politikki.

Skoðsmálið, sum Atli Dam hevur fingið frá teimum, sum hava samstarvað við hann, hevur verið, at hann var stinnur og álitisfullur stjórnarleiðari. Eingin ivi var í, hvør tað var, sum stóð við endan, og løgmaður varð sagdur at standa við endan undir øllum umstøðum. Landsstýrið var framvegis kollegialt, tá ið Atli var løgmaður. Tað vil siga, at allir landsstýrismenninir høvdu ábyrgdina av øllum, sum landsstýrið samtykti og útinnti. Allir landsstýrismenninir sótu í Tinganesi, og løgmaður gjørdi nógv fyri at fremja samstarvið.

Eyðkent fyri Atla Dam var, at hann altíð sá møguleikan, hóast tað kundi tykjast at síggja svart út. Hann nýtti orðaløg sum, at tað nú var neyðugt at herja á aftur, og at tað var neyðugt at mýkja støðuna, og tað bar sum oftast langt.

## Ongar parlamentariskar royndir

Atli Dam trein inn á politiska pallin í Føroyum 9. mars í 1970, tá ið hann var 37 ára gamalur. Tá var hann ikki alment kendur persónur í Føroyum. Hann hevði í Keypmannahavn lokið útbúgving sum verkfrøðingur, og hann hevði eitt skifti arbeitt í oljuvinnuni í Miðeystri, tá ið Javnaðarflokkurin sendi boð eftir honum at koma heima at taka við landsstýrissessi.

Hóast Atli Dam ongar parlamentariskar royndir hevði, tá ið hann kom til Føroya, so var politikkur honum avgjørt ikki ókunnugur. Atli var fyrst og fremst politiskt upplærdur heima við hús á Tvøroyri, har barnaheimið andaði og livdi í og fyri politikki. Pápin, Petur Mohr Dam, var fyrsti formaður í Javnaðarflokkinum, og eisini eftir at Atli var farin av landinum í lestrarørindum, hevði hann nógv samband við politiska umhvørvið. Bæði við politiska umhvørvið í Føroyum og eisini í Danmark. Í útisetatíðini var hann ofta at síggja á Christiansborg, og hann hevði tætt samband við nógvar danskar javnaðarmenn, sum hann m. a. hevði lært at kenna ígjøgnum politiska virksemið hjá pápanum, Peturi Mohr Dam, sum var fólkatingsmaður 1948-1957 og frá 1964 og inntil hann tók við sum løgmaður 12. januar í 1967. Tá var hann stutt frammanundan - 13. desember í 1966 - enn eina ferð valdur til fólkatingsmann.

Atli Dam duldi ongantíð, at politiska hugsjónin og politiska virksemið hjá pápanum, sum hann sá ógvuliga stórt í, hevði ógvuliga stórt árin á hugsjónina, sum hann arbeiddi fram ímóti. Orsøkin til at Atli Dam trein inn á føroyska politiska pallin hevði óbeinleiðis við pápan at gera. Tá ið Petur Mohr Dam doyði 8. november í 1968 - hann er tann einasti, sum er deyður, meðan hann hevur verið løgmaður - býtti Javnaðarflokkurin løgmansembætið um við tveir landsstýrissessir. Jacob Lindsenskov og Villi Sørensen komu í landsstýr-